Álit

í

løgtingsmáli nr. 8/2023: Uppskot til løgtingslóg um at seta úr gildi løgtingslóg um biografar

Landsstýriskvinnan í almanna- og mentamálum, Sirið Stenberg, hevur lagt málið fram 5. september 2023 og eftir 1. viðgerð 19. september 2023 er tað beint Mentanarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 21. september og 18. oktobur 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Filmsfelagið, Havnar Bio, landsstýrismannin í barna- og útbúgvingarmálum, Djóna Nolsøe Joensen, og landsstýriskvinnuna í almanna- og mentamálum, Sirið Stenberg.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Sólvit E. Nolsø, Jóhannis Joensen, Súsanna Bertholdsen, Liljan Weihe og Erling Eidesgaard) hevur hesar viðmerkingar:

Uppskotið er lagt fram, tí at lógin ikki longur verður fylgd og er óneyðug. Lógin ásetur, at landsstýrið skal góðkenna allar almennar filmsýningar, og at loyvi frá landsstýrinum skal útvegast í hvørjum einstøkum føri.

Praksis á økinum er langt síðan farið frá hesum, og fá ella eingi fylgja mannagongdini longur, og eingir trupulleikar hava stungið seg upp av at víkja frá tí, ið lógin leggur upp til. Heldur hinvegin verður mett, at tað er óheppið, at landsstýrið skal góðkenna hvørja sýning, tí tað gevur landsstýrisfólkinum møguleika at stýra, hvørjir filmar verða góðkendir, og hvørjir ikki verða.

Eitt, sum hevur fylt nógv í kjakinum, er lógin um miðlaráð til verju fyri børn og ung frá 2007, sum kom í staðin fyri táverandi filmseftirlit. Miðlaráðið skal ráðgeva, vegleiða og kunna um filmar, telduspøl, internet og annað, við serligum atliti at børnum og ungum. Miðlaráðið skal til dømis eisini seta aldursmark á filmar, sum verða vístir í Føroyum. Miðlaráðið gavst at virka í 2011, tí játtanin til endamálið varð strikað í fíggjarlóguppskotinum undir viðgerðini í Løgtingsins Fíggjarnevnd; lógin um miðlaráð varð kortini ikki avtikin, hóast ætlanir vóru um tað. Tí er tann lógin í gildi enn, men verður ikki fylgd, og Miðlaráðið verður ikki sett longur.

Meirilutin heldur, at landsstýrismaðurin í barna- og útbúgvingarmálum, sum umsitur lógina um miðlaráð, eigur at seta eitt arbeiði í verk, sum skal lýsa, um partar av lógini um miðlaráð framvegis eru neyðugir at hava. Millum annað er undir nevndarviðgerðini komið fram, at har er eingin, sum ásetur eitt aldursmark á filmar í Føroyum, og at man tí heldur seg til tey donsku aldursmørkini í føroyskum biografhøpi. Eisini er komið fram, at í lógini um miðlaráð er lagt upp til eina skipaða kunning og vegleiðing um vandar á netinum, í filmum og aðrastaðni, og at tað møguliga átti at verðið kannað, um tørvur er á at hava eina líknandi skipan í dag.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Magnus Rasmussen og Bárður á Lakjuni) hevur hesar viðmerkingar:

Lógin um biografar er frá 1984, so tað er skilagott at hyggja nærri eftir lógini og eisini meta um, hvørt hon skal tillagast ella sum í hesum førinum, har mett verður, at hon skal avtakast.

Minnilutin heldur, at tað er ikki rætt at samtykkja avtøku av biograflógini júst nú. Hetta skal síggjast í ljósinum av, at vit hava eina lóg um miðlaráð til verju fyri børn og ung, sum ikki verður fylgd. Lógin er í gildi, men Miðlaráðið til verju fyri børn og ung hevur verið óvirkið síðani 2011.

Minnilutin er av tí áskoðan, at áðrenn tosað verður um avtøku av biograflógini, eigur Miðlaráðið til verju fyri børn og ung at fáast at virka aftur samsvarandi lógini.

Minnilutin meinar, at tað altíð er rætt at verja børn og ung, og tað er júst tað, sum løgtingslógin um miðlaráð til verju fyri børn og ung, hevur til endamáls.

§ 1 í lógini er soljóðandi:

"Endamálið við lógini er at kunna og leiðbeina almenningin um filmar og telduspøl og vandamál innan miðlar annars fyri harvið at verja børn og ung."

Niðurstøðan hjá minnilutanum er tí, at neyðugt er at fáa Miðlaráðið at virka, áðrenn støða verður tikin til at avtaka biograflógina.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Mentanarnevndin, 24. oktobur 2023

Sólvit E. Nolsø formaður	Jóhannis Joensen næstformaður	Súsanna Bertholdsen
Liljan Weihe	Erling Eidesgaard	Magnus Rasmussen
	Bárður á Lakjuni	